# Navnleysi springarin trívist væl

**Tað er ikki á hvørjum degi at høvið verður at eygleiða ein livandi springara. Tey ið ikki hava roynt tað áður, fáa høvi til hetta um vikuskiftið í Klaksvík.**

SJÓMANNADAGUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Í farnu viku eydnaðist tað, sum mangir helst bert hava havt sum ætlan: At fanga ein livandi springara.

Høvið kundi nærum ikki verið betri, nú Føroya Sjómannadagur er á skránni í fiskivinnuhøvuðsstaði okkara.

Hetta stóra tiltakið er í roynd og veru longu byrja, men leygardagurin er kortini dagurin, tá flestu tiltøkini verða á skránni.

Millum tiltøkini er ein framsýning av hesum livandi springaranum, sum til høvið verður verandi í einum aliringi.

Enn tosa fólk bert um henda springaran. Talan er um ein hann-springara, men enn hevur hann ikki fingið nakað navn. Fólk hava havt høvið at koma við uppskotum til nøvn, og í dag sum ein annan dag skal støða takast til hvat navn springarin skal hava.

Seinnapartin í gjár vóru menn aftur hjá springaranum sum er í einum aliringi undir Kunoyarnesi.

- Hann sær út til at hava tað gott, sigur Hjaltur Poulsen, sum er ein av undangongumonnunum í hesi "ætlanini" við springaranum.

### Etur væl

Tað var undir springaradrápinum í Klaksvík í farnu viku, at tað eydnaðist monnum at fáa fatur á hesum springaranum.

Teir fingu hann í henda aliringin undir Kunoyarnesi, og her hevur hann verið síðani.

- Eg haldi, at hann hevur tað gott, sigur Hjaltur Poulsen, nú vit stima út móti aliringinum.

Tað er sjálvandi ilt at meta um ta veruliga støðuna. Men menn hava sæð hann bæði spælt og kastað seg uppundan viðhvørt. Tí er líkt til, at hann hevur tað gott.

Teir hava eisini verið hjá honum við føði, og tað hevur hann tikið væl við.

- Vit hava givið bæði saury, sild, høggusløkk og seið. Og hetta hevur honum dámað sera væl, greiðir Hjaltur frá.

Menn hava eisini stuttleikað sær við at geva honum livandi seið, ið onkur hevur fiskað til springaran. Tá er hann garrvillur, meðan hann roynir at fanga sær døgurðabitan.

### Nýtt heimstað

Ætlanin er tó ikki at hesin springarin skal verða verandi her úti við Kunoyarnes.

Í sambandi við Sjómannadagin skal aliringurin sleipast inn á Klaksvík, har hann verður ein partur av skránni við hetta megnar tiltak.

- Tað verður ein løta at fáa sleipað hann inn á víkina. Vit duga ikki enn at siga, hvussu tað fer at ganga.

- Vísir tað seg at tað ikki ber til, so steðga vit beinanvegin. Vit vita nevniliga ikki, hvussu hann fer at uppføra seg, tá vit sleipa, sigur Hjaltur Poulsen. Í ringasta føri kann hann møguliga leypa úr ringinum.

Ætlanin er at aliringurin skal sleipast inn á Stengurnar, har springarin verður ein partur av framsýningunum á Sjómannadegnum.

Stóri spurningurin er, hvat síðani skal henda við honum. Talan er helst um ein hann-springara, og teir vænta tí at hann fer at klára at fáa sær nóg mikið av føði inn á vánni í Klaksvík.

Óhugsandi er tí ikki, at springarin fer at verða stamgestur í Klaksvík. Tað tykist sum hann trívist í nýggja heimstaði sínum!



*Hjaltur Poulsen roynir at fáa springaran at nærkast sær. Her eydnast tað rættiliga væl (Mynd: Norðlýsið)*



*Springarin tykist hugna sær her undir Kunoyarnesi. Um vikuskiftið verður hann partur av framsýningunum á Føroya Sjómannadegi (Mynd: Norðlýsið)*

# Áhugaverd skrá fyri Føroya Sjómannadag

**Hetta er annað árið á rað, at skipað verður fyri Føroya Sjómannadegi í Klaksvík. Eins og í fjør, verður ljós aftur hesaferð varpað á ymiskt, sum hevur við havið og sjóvinnuna at gera**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrireikararnir av sjómannadegnum hava gjørt eina stóra skrá, sum byrjaði longu týsdagin, 15. august, tá ið fundur var um eftirløn í fiskivinnuni.

Mikudagin vóru eisini nøkur tiltøk á skránni. Í Atlantis hugleiddi rithøvundurin, Óli Olsen, um langfarasigling fyrr og nú, og Hans Eli Hansen, lærari, greiddi frá um ein lagnutúr við slupp. At enda luttók Hans Hjalt við sjómannavísum.

Í dag letur Bátasavnið í Leirvík upp í samband við sjómannadagin, og fiskikapping verður á Kósabrúnni fyri bæði gentur og dreingir. Eftir kappingina, kasta luttakararnir fløskupostar út í Kalsoyarfjørð.

Í morgin verður fiskivinnustevna í Skálanum, og tá verður Bátasavnið í Leirvík eisini opið aftur. Í morgin verða eisini framsýningar av føroyskum skipum og øðrum í Atlantis. Tónleikur er á skránni í annaðkvøld.

### Leygardagurin

Tann stóri dagurin, tá ið flestu tiltøkini eru á skránni, verður leygardagin, tá ið Føroya Sjómannadagur eisini verður settur.

Tað verður borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, sum longu klokkan 9 bjóðar vælkomin og heldur røðu, og síðan setir Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, dagin.

Ein hópur av tiltøkum eru á skránni fyri leygardagin.

Jóannes Hansen, rektari á Føroya Læraraskúla, fer at halda røðu, tá ið ein standmynd verður avdúkað á fiskastykkinum hjá Kjølbro.

Fyrrapartin verður togtogan millum skipsmanningar, og grindahvalur verður skorin upp.

Leygarmorgunin verður eisini ein svimjikapping um vánna, og framsýning verður av modellskipum, eins og filmur við gomlum og nýggjum verður sýndur.

Skráin fyri leygardagin er samanhangandi, soleiðis at eingin steðgur er í, og seinasta kappingin fyrrapartin verður ein hoppikapping á boyum.

Á middegi leygardagin verður kapprógving, og síðan skipar Norðoya Bjargingarfelag fyri bjargingarroynd.

### FM-kappingar

Sum leygardagurin líður, verða fleiri føroyameistarakappingar, og tann fyrsta byrjar longu klokkan 13.30.

Fyrsta FM-kappingin verður at skera agn, onnur í trolbøting, og tann triðja verður í egning.

Klokkan 16 leygardagin verður kappsigling um vánna við seglbátum, og klokkan 18.30 verða FM-kappingarnar tiknar uppaftur.

Nú verður lagt fyri við FM-kapping í sjómanstaki, og síðan verður kappast um at kasta lodd, halda dreggi, og at enda verður FM-kapping í kelving.

Leygarkvøldið verður eisini steypahandan til bestu skip og bátar í Føroyum.

Onnur tiltøk, sum eisini eru á skránni á Føroya Sjómannadegi, er framsýning av livandi fiskum, málningaframsýning, sølubúðir, matstovur, kaféir og annað.

Leygarkvøldið endar við tí, sum seinnu árini er vorðið so eftirspurt, nevniliga "dans på brygga".

Øll tiltøkini á Føroya Sjómannadegi eru ókeypis uttan dansurin á bryggjuni leygarkvøldið.

### Endar sunnudagin

Tiltøkini hjá Føroya Sjómannadegi, sum byrjaðu longu týsdagin í hesi vikuni, endar sunnudagin.

Tá verður sjómansgudstænasta í Christianskirkjuni, har Andreas Andreassen, sum í dag er útróðrarmaður, prædikar.

Andreas hevur annars verið prestur í fleiri ár.

Sunnudagin fara Óli Jacobsen og enski trolaraskiparin, Ken Knox, at hava framløgu í Atlantis.

Filmar við føroyskum skipum verða eisini sýndir í Atlantis sunnudagin, og Bátasavnið í Leirvík verður opið.

Sunnudagurin endar við einum sjómansmøti í tjaldinum á bryggjuni, og her verður tað Rógvi Joensen, sum skipar fyri.